# Ongin fólkaatkvøða í Suðuroy um at leggja kommunur saman

**Kommunurnar í Suðuroy taka ikki undir við áheitanini um at halda fólkaatkvøðu um kommusamanlegging samstundis sum fólkatingsval er**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað verður ikki enn at hvalbingar, og aðrir suðuroyingar, sleppa á fólkaatkvøða um at leggja alla Suðuroy saman í eina kommunu. Fleiri halda, at fyrst mugu fyrimunir og vansar við samanlegging, lýsast*

Tað verður ongin fólkaatkvøða í Suðuroy um at leggja kommunur saman á hesum sinni.

Sostatt er tað greitt, at kommunurnar í Suðuroynni fara ikki at taka undir við áheitanini frá Tvøroyrar Kommunu um at halda fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging, samstundis sum fólkatingsvalið er týsdagin.

Tá ið kommunuvalið var í november, heitti Sumbiar Kommuna annars á hinar kommunurnar um at halda fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging samstundis.

Spurningurin, sum veljararnir skuldu svara, var einfaldur. Hann ljóðaði: Skal øll Suðuroyggin verða ein kommuna. Og so skuldi veljarin svara Ja ella nei.

Ta ferðina var tað bara í Sumba og á Tvøroyri, at veljararnir sluppu at siga sína hugsan um kommunusamanlegging og í báðum kommunum var heilt greiður meiriluti fyri at leggja alla Suðuroy í eina kommunu.

Men nú veljararnir skulu á val til fólkatingið týsdagin, heldur Tvøroyrar kommununa tað vera eitt gylt høvi hjá hinum fimm kommununum í Suðuroynni at spyrja veljaran, hvat teir halda um kommunusamanlegging.

## Vilja hava kanning

Men tað er nú greitt, at hinar kommunurnar fara ikki at taka av, vísir ein spurnarrunda hjá Sosialinum.

Í fyrsta lagi halda kommunurnar, at skotbráðið er ov stutt, tí brævatkvøðurnar eru longu við at koma inn.

Men tað eru eisini fleiri kommunur, sum ikki halda at tað er rætt at hava fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging, sum støðan er nú.

Tær halda, at grundarlagið hjá veljaranum at taka støðu útfrá, er alt ov veikt, sum er.

– Veljarin veit ikki, hvat ein kommunusamanlegging førir við sær og, hvørjir fyrimunir og vansar eru við eini samanlegging, halda kommunurnar.

Kommunurnar leggja hinvegin dent á, at tær hava onki ímóti at arbeiða við málinum um samanlegging.

Hetta var millum annað støðan hjá bygdaráðnum í Fámjin, sum hevði málið til viðgerðar hóskvøldið. Men hetta er eisini støðan hjá Levi Niclasen í Hvalba, borgarstjóra í Hvalba og Eli Frederiksen, borgarstjóra í Porkeri.

Tí eru tað fleiri kommunur í Suðuroy, sum vilja hava eina fakliga lýsing av, hvat ein kommunusamanlegging hevur við sær av fyrimunum og vansum.

Kommunurnar halda, at fyrrenn ein slík lýsing er gjørd, hevur veljarin onki grundarlag at byggja eina støðu á.

Eli Frederiksen væntar, at spurningurin um at gera eina slíka kanning, fer kanska at verða umrøddur, tá ið kommunustýrislimir í Suðuroy fara at hittast í næstum.

Men hann heldur, at tað hevði verið rættast at onkur av teimum báðum størru kommununum reisti málið.

Tá ið Fámjins kommuna hevði málið fyri hóskvøldið, var eitt sjónarmið, at skal talan verða um samanlegging, er tað rættast at byrja við teimum báðum størru kommununum, Vági og Tvøroyri.

Har er sjónarmiðið somuleiðis, at skal talan verða um samanlegging, skal øll oyggin verða ein kommuna. Verður talan um tvær kommunur, verður ein stór bygd í hvørjum øki, sum fer at verða fullkomiliga einaráðandi. Verður talan um eina kommunu fer javnvág at vera í ímillum norðaru og syðru helvt.

Ì Fámjin varð eisini spurningurin reistur um at tíðin ikki var búgvin til samanlegging enn, men at kommunurnar áttu at styrkt kommunala samstarvið fyrst.

Men afturímóti tí varð ført fram, at tað var ikki so lætt hjá kommununum í Suðuroy at samstarva.

Eitt nú vóru royndir gjørdar at endurskipa felagskommununa, men tað miseydnaðist.

# Heilt burturvið at flyta miðnámsskúlan úr Vági

**Signar á Brúnni, sum varð landsstýrismaður skúlamálum, tá ið avgerðin varð tikin um at byggja miðnámsskúlan í Vági, skilir ikki ætlanina um at flyta skúlan til Hovs**

MIÐNÁMSSKÚLI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er púra meiningsleyst at flytað ætlaða miðnámsskúlan í Vági, til Hovs.

Tað heldur Signar á Brúnni, sum hevur verið landsstýrismaður í skúlamálum.

Hann sigur, at tað var í hansara tíð sum landsstýrismaður í 1998-2000, at avgerðin um at raðfesta skúlan í Suðuroy, varð tikin.

Annars skuldi hann byggjast í Hovi.

– Tað varð samtykt at byggja hann í Hovi tí eg skilti, at hetta var tað, sum suðuroyingar kundu semjast um innanhýsis.

Men so broyttust støðan og semja varð um at byggja hann í Vági.

– Síðani hevur eisini full semja verið um at byggja skúlan í Vági. Bæði Landsstýrið og Løgtingið hava samtykt tað og síðani hevur verið arbeitt útfrá tí.

– Eftir mínum tykki er ein sera góð og snøgg og snotilig verkætlan komin burturúr. Samstundis er grundstykkið sprongt og slættað eftir tí skúlabygningi, sum skuldi byggjast har

## Meiningsleyst

Signar á brúnni sigur, at nú er ætlanin komin so langt, at tað er klárt at bjóða út og higartil eru nakrar milliónir brúktar upp tað.

– Tí er tað fullkomiliga meiningsleyst at koma afturumaftur nú og at tosa um at flyta skúlan nú, staðfestir hann.

– Serliga tá ið hugsað verður um, at tað er so stutt at koyra, leggur hann afturat.

Hann vísir á, at bæði landsstýrismaðurin í skúlamálum og løgmaður hava ført fram, at hetta verður gjørt fyri at kunna byggja heilsuskúlan saman við miðnámsskúlanum við tí fyri eyga at gera tað lutfalsligabíligari at byggjaog fyri at rationaliserað raksturin.

– Men her er javnaðarflokkurin í andsøgn við seg sjálvan, tí í Havnini hevur javnaðarflokkin ta áskoðan, at studentaskúlin skal verða verandi fyri seg sjálvan í Hoydølum og skal ikki verða við í ætlaða skúladeplinum í Marknagili.

– Hví tað so skal verða so avgerðandi, at miðnámsskúlin í Suðuroy verður bygdur saman við einum heilsuskúla í Hovi, skilji eg ikki.

Hinvegin skilir gamli landsstýrismaðurin heldur ikki, hvat ein miðnámsskúli og ein heilsuskúli hava til felags sum ger tað so umráðandi, at teir liggja saman.

– Tað kann bara vera sjálvur bygingurin, tí annað er tað ikki. Annað dugi eg ikki at síggja, hvat teir hava felags, tí tað eru tveir heilt ymiskir skúlar.

Hevði talan verið um ein studentaskúla og ein handilsskúla, kundi eg skilt tað, tí teir hava nógv meiri í felag.

## Báðar skúlarnar í Vági

Men Signar á Brúnni heldur, at er tað so avgerandi at byggja báðar skúlarnar saman, er at byggja báðar skúlarnar saman vesturi í Eiðinum í Vági, har stykkið til miðnámsskúlan longu er grivið út.

Hann sigur, at botnar hetta í einum stríði ímillum Vág og Tvøroyri og standast politiskir trupulleikar av at flyta ætlaða heilsuskúlan á Tvøroyri til Vágs, ber til at loysa tað við at leggja onkrar aðrar tænastur á Tvøroyri

– Eitt nú hevur tað verið frammi at umsitingin av Strandferðsluni skal flytast til Suðuroyar. So kundi hon hóskandi verðið løgd á Tvøroyri, har báturin siglur. Hann leggur tó dent á, at hann leggur seg ikki út í, hvat verður gjørt á tí økinum, men hann nevnir hetta bara sum eitt dømi. Tað eru uttan iva eisini aðrir møguleikar, sigur hann.

Hann leggur afturat, at hann hevur eisini frætt, at tað er ikki full semja í tingmanningini hjá samgonguni um at gera skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági.

– Er tað rætt, skilji eg onki, tí so er lítil álvari í ætlanini og eg skilji fullvæl, at ein meiriluti í býráðnum í Vági segði kortanei.

– Hevði landsstýrið tikið spurningin um at broyta ætlanina, áðrenn fyrireikingarnar vóru byrjaðar, kundi eg skilt tað.

– Men at koma nú, tað er klárt at fara undir byggingina, er púra meiningsleyst, sigur Signar á Brúnni.



*– Hevði landsstýrið tikið spurningin um at broyta ætlanina, áðrenn fyrireikingarnar vóru byrjaðar, kundi eg skilt tað. Men at koma nú, tað er klárt at fara undir byggingina, er púra meiningsleyst, sigur Signar á Brúnni*